Fundur í Mentanarnevnd Løgtingsins 29. okt. kl. 10.40

Jógvan í Lon Jacobsen

Til viðgerðar: stavraðið

Politikarar skulu helst ikki fara at pilka við stavraðið, tí nú hevur verið friður so leingi.

Men en havi nakrar prinsipiellar viðmerkingar.

Mín fyrsti spurningur er: hvørja funktión hevur eitt stavrað? Funktiónin er, at tað vísir alla rekkjuna av bókstøvum í einum máli, skipaða í eina ávísa raðfylgju., tvs. at stavraðið er eitt reint praktiskt amboð. Stavraðið skal fyrst og fremst vísa raðfylgjuna av stavunum í málinum: hvar finna vit bókstavin k?, jú hann liggur millum j og l.

Og so skuldi mann trúð, at allir stavirnir vóru at finna har, men her kemur sperðil í systemið, tí har mangla nakrir stavir. Og tað er bæði løgið og ólogiskt.

Tað er ikki vandi fyri nakrari glíðibreyt, um vit taka teir útihýstu stavirnar inn aftur, tí at tað er Stavsetingarorðabókin, sum ásetur, hvussu orð skulu stavast.

Tann næsti spurningurin er: Nær ella hvussu ofta hava vit brúk fyri at tosa ella hugsa um stavraðið? Tað er næstan bara, tá vit eru ósamd um tað. Akkurát sum nú.

Eg komi at hugsa um tónastigan, tá vit tosa um stavraðið

Tónastigin er býttur sundur í átta stig: C-D-E-F-G-A-H-C

Hvussu ofta tosa tónleikarar ella komponistar um sjálvan tónastigan sum fyribrigdi? Hann er bara har og liggur undir øllum

Á sama hátt, haldi eg, er við stavraðnum.

Duga vit stavraðið, kenna vit raðfylgjuna, tá vit t.d. skulu seta ein bókmentalista upp ella leita eftir einum orði ella navni í einum registara í eini prentaðari bók.

Og so er tað Málráðið: Málráðið hevur m.a. til uppgávu at áseta føroyska stavseting.

Hana síggja vit í stavsetingarorðabókini

Har finna vit eitt nú orð við c og w, z: c-moll, og carnetin, w: Wales og watt, z: zink (her er SSO liberalari enn móðurmálsorðabókin, sum bara hevur sink við s.

Og minst til: z verður brúkt, sjálvt um tað ikki er við í stavraðnum.

Tvs.: Tað er einki logiskt samband millum stavseting og stavrað.

Stavraðið sigur einki um, hvussu orð skulu stavast. Um c er í stavraðnum, merkir tað ikki, at sitrón skal hava c og ikki s.

Eg eri komin til tað, at spurningurin um stavraðið er minst av øllum ein málsligur spurningur.

Hann er meira ein mentanarpolitiskur spurningur: Hvat vilja vit vísa við stavraðnum?

Stavraðið verður uppfatað sum eitt málpolitiskt manifest uttan stórvegis innihald.

Hetta er í stóran mun symbolpolitikkur.

Móðurmálsorðabókin hevur tað skerda stavraðið uttan c t.d., men í orðabókini finna vit orð, sum hava c.

Hetta vísir, at sjálvt um stavraðið ikki inniheldur c, so hava vit orð í orðabókini, sum byrja við c.

Og tí kann mann av sonnum spyrja: hvørja funktión stavraðið hevur.